


www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 04 - 2013

# Oljuportalurin væl vitjaður

Føroyski oljuportalurin - www.oljan.fo - er ein heimasíða, sum verður vitjað av alsamt fleiri og fleiri føroyingum og eisini útlendingum. Hon setti eisini egið met í farnu viku, síðani hon gjørdist partur av Portal.fo høvuðssíðuni. Hesa vikuna var talið av brúkarum umleið 11.000 og lá oljan.fo á einum 8. plássi á Vevmátingarlistanum hjá Gallup av tilsamans umleið 50 ymiskum føroyskum heimasíðum. Hesa vikuna varð høvuðsgreinin á oljan.fo samrøða við føroyska tyrluskiparan, Terja Jacobsen úr Hoyvík, sum saman við tveimum øðrum føroyskum tyrluskiparum hevur fingið arbeiði í oljulandinum Qatar. Hægsta talið av brúkarum annars í eina viku var í viku 8 í 2012, tá tað var 12.966. Tað var 1. september 2011, at hesin nýggi portalurin fór av bakkastokki og hevur hann fyrst og fremst umrøtt føroyska olju- og frálandavinnu, harnæst útlendska olju- og frálandavinnu. Oljuportalurin hevur eisini lagt seg eftir at umrøða orkumál sum heild, eitt nú spurningar um varandi orku í Føroyum. Eisini hevur portalurin gjørt nógv burtur úr menningini og gongdini í Grønlandi og Arktis, har stórir framtíðar møguleikar eru innan oljuvinnuna. Hetta góða hálvtannað árið oljan.fo hevur verið partur av Portal-universinum hjá FT Online, hava umleið 1700 greinar verið lagdar út. Hetta svarar til umleið 2 til 3 greinar hvønn tann einasta dag í árinum. Tað er FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólkur, sum umsitur www.oljan.fo og hevur Jan Müller ábyrgdina av innihaldinum. Øll eru vælkomin at senda hugskot og tilfar til oljuportalin, ikki minst søgur um føroyingar, sum arbeiða í hesi vinnu. Sendið til jan@foib.fo ella ringið 211820. Myndirnar vísa forsíðuna á oljan.fo nú um dagarnar og hagtøl fyri oljan.fo og aðrar heimasíður.